Aftaná sjórænararnar í Hvalba kom skansin

Um hvussu føroyingar bóðu kong um at fáa vápn og frálæru í vápnanýtslu. Um sjóverju undir Føroyum í 17. øld og um at Skansin í Havn varð bygdur aftaná at Turkarnir høvdu herja í Føroyum

Herfyri vórðu vrakpettir funnin í Hvalba. Hóast tað ikki er prógvað, so er møguleikin fyri, at hesi vrakpettir stava frá einum turkiskum skipi, sum gjørdi um seg í Suðuroy á sumri 1629.

Í hvussu er, so eiga vit skrivligt tilfar, sum prógvar, at turkisk ófriðaskip herjaðu á sumri 1629. Mest álítandi keldan er løgtingsbókin frá hesum tíðarskeiði. Men ein samtíðarmaður, Lucas Debes, prestur í Suðurstreym skrivar eisini um sjórænararnar í bókini Færoæ et Færoa reserata. Hendan kom út í 1673/74.

Lucas Debes viðgerð ófriðaskip í Føroyum. Hann nevnir millum annað avriksverkið hjá Magnus Heinasson, tá hann stríddist móti sjórænarunum.

Hann nevnir eisini hvussu fronsk og bretsk skip hava gjørt ónáðir í Føroyum.

Hann skrivar um at føroyingar hava gjørt mótstøðu tá ófriðaskip hava herjað: "Men eftersom deres (føroyinga) Formue bestod udi Land-Gods, Kvæg og vilde Får, hvor paa Fjenden kunde gøre dennem liden skade, så haver de beskærmet sig paa de høje fjelde: dog haver Suderingerne en Gang holdt offentlig Slag med Irske Sø-Røvere, der de ikki straks vilde forlade Landet, hvorudover de forsamlede sig imod dennem og sloge dennem alle ihjel. Saadant Folk haver ofte stor Fortræd imod dette fattige Land, og var man fast ikke noget Aar fri for dennem udi forrige Tider."

Her vísur Lucas Debes á at í gomlum tíðum var rættuliga vanligt, at ófriðaskip gjørdu um seg í Føroyum. Hann nevnir nøkur dømir:

Tann seinasti biskuppurin í Føroyum, Her Peder Ribe var so illa plágaður av fronskum sjórænarum, at hann at enda noyddist at flýggja úr Føroyum.

"Her Rasmus Sogne-Præst udi Suderø pinte de saaledes med en line om hans Hoved for Penge Skyld, at han derefter var moxen ubekvem til sit Embede."

Eingilskir fiskimenn

Lucas Debes skrivar, at eingilskir fiskimenn plagdu við valdi at taka føroyingar umborð á fiskiskipini, tá teir vóru á veg til Íslands. Ongin varð eirdur. Sjálvt prestarnar tóku teir við sum trælir fyri at hjálpa til umborð.

Tá teir komu aftur úr Íslandi vórðu føroyingarnir settir á land har sum lættast lá fyri:

"Saaledes haver Færø udi lang Tid tilforn været ligesom et almindelig Rov for saadanne grumme Ulvers Tænder."

Turkar í Suðri

Bókin hjá Lucas Debes kom út góð fjøriti ár aftaná at at turkar høvdu herjað í Suðri og tí er ikki løgið, at hann eisini nevnir hesa hending. Lucas Debes greiðir frá prestinum, Hr. Povel Rasmussøn, sum flýggjaði við einum smádrongi undan turkum. Og at hann gjørdist óður í høvdinum av hesi hending.

Og Lucas Debes nevnir eisini, at danir gera nakað við hóttanina um sjórænararnir. Hann skrivar:

"Udaf saa stor Usikkerhed havde de fremfarne Konger højlovligts udi Hukommelsen, nemlig Fredricus II og Christianus IV af deres kristelige Omsorg og Medlidenhed over disse deres fattige Undersaater udgjort Skibe til at krydse paa disse skadelige Mennesker. Iblandt de Kaptajner, som disse Skibe førte haver Magnus Heinesøn været den fornemste, hvilken gjorde saa tyndt iblandt dette slags Folk, saa at man, saa længe Magnus levede, forman lidet til dennem.

"Men deri Magni hoved faldt af, opløfte disse arrige Mennesker deres Hoved igen, og øvet sig igen som tilforn."

Síðan heitir Christian IV á Jørgen Daa um at koma sjórænarunum í Føroyum til lívs. Lucas Debes skrivar:

"Christian den fjerde haver udgjort et Skib, med en mandhaftig og tapper Mand, ærlig og velbyrdig Jørgen Daa, hvilken og i lige Maade haver gjort sin yderste Flid at dæmpe saadant Røver-Pak."

"Iblandt andre overkom han en ireske Sø-Røvere i Vestmannahavn udi Strømø. En Del af Folket undrendte straks over Landet, og tog en af Indbyggernes baade og for fra Færø til Hetland: som de igen bleve, bleve fangne og ophængte."

Efter, Jørgen Daa haver Højstbemeldte Hans Kongl. Majest. andre Kaptajner og Skibe udkommanderet under Færø at krydse, hvilke havde almindeligen deres Havn udi Skaale-Fjord i Østerø, hvor af Havnen nu kaldes Kongs-Havn.

Ov dýrt við sjóverju

Men danska sjóverjan av Føroyum kostaði ov nógv. Og tí datt hon niðurfyri. Lucas Debes skrivar:

"Men eftersom paa saadanne Skibes Udredning gik aarligen en stor Omkostning større end som Kongl. Majest. Interesse udaf Landet sig kunde bedrage, haver Højstbemeldte Konning Christian den Fjerde naadigst for godt anset, at lade gøre en Befæstning udi Thorshavn mod al fjendtlig uformodelig Anløb, eftersom der ikke aleneste bevares Kongl. Maj. Landskyld, men endog al Købmands-Vare til det ganske Lands Underholdning."

Lucas Debes sigur, at Skansin í Havn var bygdur aftaná at Turkar høvdu herjað í Føroyum. Tað vil siga, at brævið hjá Joen Justinussøn, løgmanni og báðum sýslumonnunum í Suðri hevur givið úrslit.

Hann skrivar eisini, at aftaná at Turkar herjaðu í Suðri hava føroyingar ikki verið plágaðir av ófriðaskipum í sama mun:

"Og haver siden den Tid nogenlunde været sikkert for saadanne Sø-Røvere, uden naar Krig og Orlog er indfalden mellem Danmark og andre Riger, da man som troligt kan være, ofte anfægtes af nabolige Fjender."

Løgtingsbókin

Í brævinum, sum Joen Justinussøn, løgmaður



Orð: Jústinus
Myndir: Kalmar og Rógvi